





**Náttúra og annað**

Sjálvsagt eru eisini náttúrumyndir. Og eins og allar hinar myndirnar, so eru tær góðar. So góðar í støðum, at sjálvt hin kræsnasti knappliga skilir bæði Ingálv av Reyni og Kára Svensson til fullnar.

Men sanniliga, um tað ikki eisini sæst, at í Føroyum eiga vit eisini nýmótans hús. Skip, bilar, berghol. Billardborð og mangt annað.

Bókin er sannur fongur. Føroyar eru her tiknar á bóli. Men talan er um eina vakra ungmoy, ið trínur fram í dagsljósið, so hvørt sum blaðað verður í bókini, ið hevur heitið "Forbi Færøerne".

Her er tað gestur, ið talar. Gesturin, ið er sloppin innar. Og hóast tað er myndatala, so eru myndirnar málandi greiðar og vakrar. Tó ikki málaður vakurleiki, men føroyskur vakurleiki, tá hann er vakrastur, myrkastur og skitnastur. Tá hann er gerandissligur.

Gerandiskostur. Fuglaveiða, fongurin í einum gomluim kari, fólk til arbeiðis, brattir bergveggir, fólk í stevnustási. Her eru føroyar, sum tær nú einaferð veruliga eru. Avmyndaðar, áårenn smyrdáman slapp farmat.

Per Folkver takkar á baksíðuni teimum, ið hava hjálpt honum við bókaætlanini. Teimum, ið gjørdu tað gjørligt at fáa bókina til veruleika.

Per Folkver og bókin Forbi Færøerne er givin út á forlagnum Politisk Revy og er hugtakandi og avdúkandi. Ein háttur hjá føroyingum at síggja í egnan heim við fremmandum eygum.

Bókin er ein vakur varði. Ein bók, ið staðfestir, at orð eru fátøk og at ein mynd kann siga meira, enn túsund orð.

Ein bók, ið mentamálaráðharrin í útvarpsviðtali segði seg hava á náttborðinum, tá hann tók við í nýggja starvinum. Og ein bók, ið kann viðmælast til allar føroyingar.